Sagnir

Sagnir eru skaldskapur av mannamunni. Tær eru søgur um tilburðir, ið veruliga hava verið og um fólk, ið hava livað. Sagnir eru av fyrstan tíð fortaldar ætt til ætt og eru tí merktar av teimum, sum hava sagt frá teimum, soleiðis, sum hesi hava minst til hendingarnar í søgnunum. Tí kunnu sagnirnar ikki metast sum reinar søguligar keldur.

Tvey høvuðseyðkenni eru viðvíkjandi søgnum. Tað fyrra er, at ein søgn altíð vil vera sonn og ikki ein søga, sum onkur hevur gjørt. Hitt høvuðseyðkennið er, at søgnin altíð er bundin at staði, tíð og persónum. Eins og ævintýrini hava sagnirnar ein serligan felags stíl, tí tá hevur verið lættari at minnast frásøgnina. Tað er *sjáldan* meira enn ein hending í hvørjari søgn, tó eru undantøk. Sagnirnar hava eina byrjan, eitt hæddarpunkt og ein enda. Bara ein søgutráður er í hvørjari søgn, og søgugongdin er einføld. Bara týðandi hendingar verða tiknar við, og tað er bara ein kjarni. Í søgnini eru altíð fáir persónar. Talan kann vera um ein, tveir ella hendinga ferð um tríggar persónar. Eingin óviðkomandi persónur er við. Samrøður verða bara endurgivnar óbeinleiðis. Hóast samrøður ongantíð verða beinleiðis endurgivnar í eini søgn, kunnu partar av einari samrøðu og serliga heppið málbrúk vera tað grundleggjandi í teimum.

Persónarnir í søgnum verða ofta grunt lýstir, oftast hoyra vit bara um tað, sum serliga lýsir teir. Summir verða lýstir við navninum, t.d. Páll fangi og sterka Marjun. Høvuðspersónarnir í teimum flestu søgnunum eru bøndur. Sagnirnar gera nógv burturúr, hvussu nógva jørð teir eiga, ella hvussu stórir garðarnir eru. Eitt fast mynstur kemur fyri aftur og aftur, har tað eru bøndur, sagnirnar eru um: teir eru sterkir, raskir og arbeiðssamir, men hava ringt sinnalag. Sum dømi kunnu nevnast Ormur bóndi á Skála og Regin í Toftum.

Í nøkrum søgnum eru konufólk høvuðspersónar. Hesar kvinnur duga antin gand, brúka sítt vald ella eru tær líkar monnum við tað, at tær byggja hús og garðar. Sum dømi kunnu nevnast Annika í Dímun, Húsfrúgvin í Húsavík og Marjun Lavarsdóttir í Øravík.

Í heilt fáum søgnum eru húskallar og onnur fólk høvuðspersónar. Hetta lýsir helst tíðina, sagnirnar eru frá, har mett varð, at hesi høvdu lítla og onga tign.

Vit kunnu býta sagnir upp í fýra ymisk sløg:

1. Persónssøgusagnir:

Hesar sagnir eru um kendar persónar og hendingar, sum teimum hava verið fyri. Ein stórur partur av teimum prentaðu føroysku søgnunum eru persónssøgusagnir t.d. Húsfrúgvin í Húsavík.

2. Huldusagnir:

Hetta eru sagnir um ymsar hendingar og ymisk viðurskifti millum tey kristnu og huldufólk, eisini nevnd “tey heidnu” ella “tey fornisku” t.d. Huldubarnið.

3. Upprunasagnir:

Í hesum bólkinum eru sagnir um upprunan til serstøk fyribrigdi, eyðkendar formar í náttúruni og annað. Tær kunnu eisini greiða frá upprunanum til ávís staðarnøvn t.d. Risin og Kellingin.

4. Ferðasagnir:

Ferðasagnir eru eyðkendar av, at sagnirnar eru at finna víða um lond og í ymsum tilburðum t.d. Kópakonan.

Vert er at hava í huga, at ein søgn mangan kann roknast til fleiri bólkar samstundis.

Samanumtøka:

- Sagnir eru skaldskapur av mannamunni
- Sagnir eru søgur um tilburðir, ið veruliga hava verið og um fólk, ið hava livað
- Tvey høvuðseyðkenni er í sagnum:

a. Søgnin vil altíð vera sonn
b. Søgnin knýtir seg at staði, tíð og persónum

- Sagnirnar hava eina byrjan, eitt hæddarpunkt og ein enda
- Sjáldan meira enn ein hending í søgnum, tó eru undantøk
- Fýra sløg eru av søgnum:

  a persónssøgusagnir - vit hoyra um kendar persónar og hendingar

  b huldusagnir - sagnir við ymiskum viðurskiftum millum tey kristnu og hulduf ólk

  c upprunasagnir - sagnir um upprunan til sertøk fyribrigdi og upprunin til ávís staðarnøvn

  d ferðasagnir - hesar sagnir finnast bæði í Føroyum og í øðrum londum

  - Sagnirnar kunnu greinast eftir greiningafrymlinum til sagnir

Greiningarfrymil
til
sagnir

1. Ger ein samandrátt av søgnini.
2. Hvat slag av søgn er søgnin og hvar finnist hon?
3. Hvar fer søgnin fram?
4. Bygnaður:

a. Inngangurin: Hvat sigur inngangurin lesaranum?
b. Søgnin: Hvørjar hendingar verður sagt frá um?
c. Endin: Hvussu endar søgnin?

5. Hvørjir persónar eru nevndir í søgnini?
6. Lýs persónarnar: Navn á høvuðspersóninum, útsjónd, aldur, verumáta, sálarligu støðu teirra, broyting av sálarligu støðu teirra, viðurskifti millum høvuðspersón og eykapersónarnar.
7. Hvat heldur tú um søgnina? Grundgev.
8. Er ein reyður tráður í søgnini?
9. Hvørji evni viðger søgnin?
10. Set søgnina í frásjón.

(Sprotin um: *tann reyði tráðurin í einum:* tað, sum gongur ígjøgnum e-t; eyðkenni við e-m; boðskapurin í e-m [*ísl.* e-ð er rauði þráðurinn í e-u, *dan.* den røde tråd])